

## Funnu gamalt tempul

Fornfrøðingar hava funnið eitt grikskt tempul í Alexandria í Egyptalandi. Teir siga, at templið varð helst bygt umleið 230 ár fyri Kristi føðing. Í templinum, sum er 15 ferðir 60 metrar stórt, hava fornfrøðingarnir funnið umleið 600 standmyndir av ymsum slagi. Eitt nú eru nógvar standmyndir av kettum, og tað siga fornfrøðingarnir vera eitt tekin um, at templið var halgað kettu- og leyvuguðinum Bastet. Herumframt eru nakrar guðamyndir og fleiri standmyndir av kvinnum og børnum, skrivar Reuters.

# Politisk bumba undir Obama

**At republikanararnir vunnu senatsvalið í Massachusetts í gjár kann gera tað trupult hjá Barack Obama, forseta at fáa meiriluta fyri uppskotinum at nýskipa heilsuøkið**

USA

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*
*Myndir: AP*




*Scott Brown vann óvæntað senatsvalið í Massachusetts, og tað kann forða fleiri stórmálum hjá Barack Obama*

Veljararnir í Massachusetts skuldu velja senator fyri Edward Kennedy, sum doyði í august í fjør. Massachusetts hevur verið ein av háborgunum hjá demokratunum. Kennedy-ættin hevur umboðað statin í Senatinum í meiri enn eina hálva øld. Men tað vísti seg ikki, at demokratarnir áttu nakran, sum kundi lyfta arvin eftir tann seinasta Kennedy, og tí var tað tað republikanska valevnið Scott Brown, sum kundi halda sigursrøðuna í nátt.

- Eg vóni, at okkara fagnaður hoyrist líka til Washington D.C.. Í kvøld hava tær ópheftu atkvøðurnar í Massachusetts sagt sína hugsan, segði hann við sínar stuðlar, sum sjálvandi vóru ovurefgnir.

### 59 atkvøður

Tá valstríðið byrjaði og til fyri stuttum var eingin ivi um, at tað demokratiska valevnið, Martha Coakley, fór at vinna valið, og eina tíð var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin fór at verða.

Tann óvæntaði ósigurin í Massachusetts kann fáa álvarssamar avleiðingar fyri royndirnar hjá Barack Obama, forseta at fáa eina nýggja lóggávu á heilsuøkinum, og úrslitið kann eisini leggja fót fyri ætlanum forsetans á veðurlagsøkinum, skrivar New York Times.

- Eg vildi ynskt, at vit høvdu onnur og betri tíðindi at bera hiðani í kvøld, men so er ikki, segði Martha Coakley, tá hon noyddist at ásanna úrslitið.

Við 59 atkvøðum í Senatinum skal Obama hava minst eina republikanska atkvøðu fyri at sleppa undan, at republikanararnir kunnu leggja honum og uppskotum hansara fótonglar í vegin. Demokratarnir høvdu longu undan valinum í gjár ilt við at fáa heilsunýskipanina ígjøgnum, og tað bøtir tí ikki um útlitini, at tann nývaldi senatorurin undir valstríðnum boðaði frá, at hann er ímóti uppskoti forsetans. Hansara grundgeving er, at nýskipanin fer at elva til skattahækking og at økja ta almennu skuldina.



*Edward Kennedy umboðaði Massachusetts í Senatinum í samfull 46 ár. Nú áttu demokratarnir har ongan, sum kundi lyfta arvin eftir hann*

### Taktikkur

Meðan republikanararnir hátíðarhalda tann søguliga sigurin, sleikja demokratarnir sárini og eru longu farnir undir at leggja taktikkin fyri, hvussu teir skulu fáa heilsulógirnar ígjøgnum Kongressina.

Senatið samtykti eina heilsunýskipan sjálvan jólaaftan við 60 atkvøðum fyri og 39 ímóti. Allir demokratarnir atkvøddu fyri, og allir republikanararnir atkvøddu ímóti. Umboðsmannatingið hevur longu samtykt sína heilsunýskipan, og síðani jól hevur so verið arbeitt við at samskipa tær báðar samtyktirnar.

Eygleiðararnir hjá Washington Post vænta, at demokratarnir fara nú at royna at fáa Umboðsmannatingið at samtykkja tað uppskotið, sum Senatið samtykti jólaaftan. Eftir tí uppskotinum fáa umleið 30 milliónir amerikanarar heilsutrygging, og tá er talan um fólk, sum onga heilsutrygging hava frammanundan. Tað er tó als ikki vist, at úrslitið verður tað sama í Umboðsmannatinginum sum í Senatinum.

- Eg haldi, at vit eru øll á einum máli um, at tað eru partar av uppskotinum, sum mugu broytast. Vit eru ikki samd, men vit fara at royna at loysa trætuna, sigur Nancy Pelosi, sum er formaður í Umboðsmannatinginum, við Washington Post.

### Mist stevið

Ein møguleiki, sum varð umrøddur í amerikonsku fjølmiðlunum í nátt, er, at demokratarnir fara at royna at útseta skiftið í Senatinum, soleiðis at teir kunnu skunda heilsunýskipanina ígjøgnum, áðrenn Scott Brown verður innsettur sum senatorur. Hesum fara republikanararnir sjálvandi at royna at forða fyri, og formaður teirra, Harry Reid, segði við AP í nátt, at Brown verður innsettur, so skjótt flokkurin hevur fingið pappírini frá valmyndugleikunum í Massachusetts.

Úrslitið í nátt er ikki serliga hugaligt fyri demokratarnar og Barack Obama, nú tað fer at styttast til kongressvalið í heyst. Tað var mótstøðan ímóti heilsunýskipanini, sum gav Scott Brown sigurin, og fleiri eygleiðarar tulka hetta sum eitt tekin um, at Hvítu Húsini hava ikki sama stev sum meirilutin av amerikanska fólkinum.

Eygleiðararnior siga, at Obama rindar prísin, tí tað kostar at stríðast fyri einari dýrari heilsunýskipan í einari tíð, har teir flestu veljararnir hava arbeiðsloysið fremst í huganum. Harafturat fer úrslitið í Massachusetts ivaleyst at hava við sær, at sjálvt teir mest hóvligu republikanararnir í Kongressini verða verri at fáast við nú, skrivar New York Times.